SOSIALURIN

Nr. 56 — 8. AUGUST 1964 — 37. ÁRG.

Í DAG

Frá orðadráttinum um løgmannsrøðuna

Hanus sigur, at einki er gjørt

Allra fremsta høvuðsmál tjóðveldisins til seinasta val var hervaldið. Hervaldið av landinum! Hetta var rakstrarrópið á fundum og í bløðum. Allastaðni var niðurlagið hitt sama. Tað ráddi bara um at velja tjóðveldisflokkin. Tað var tað sama sum at reka alt hervald av landinum, steðga herútbyggingini og forða fyri, at landið var útbrynjað við atomvápnum.

Undir viðgerðini av figgjarlógini helt Hanus við Høgadalsá — ivaleyst heimsins løgnasti politiski yvirleypari — eina annars einki sigandi røðu, har hann reint og greitt segði, at hetta landsstýrið als einki hevði gjørt við hernaðarmálið. So vita vit tað; men er hetta ikki prøvt lyftisbrot móti veljarunum, sum við ósannindum í hópatali, ósiðligari og andstyggilgari blaðskriving lótu seg lumpa at velja tjóðveldisflokkin, tí hann — og einans hann — vildi reka hervaldið av landinum.

Teir menn, sum ikki eru førir fyri at halda í teymarnar á sukur- og silkisokkaprisunum, eru neyvan menn fyri at reka ein einasta hermann av nakrari herstøð.

Niðurstøðan verður so tann, at tjóðveldismenn enn higartil bara hava hildið veitslu saman við hervaldinum.

Flokkurin

FÓLKATINGSVALIÐ

Nú er endaliga avgjørt, at fólkatingsvalið verður 22. september.

Tað er nú toluliga greitt, at triggir flokkar koma at luttaka í valinum: javnaðarflokkurin, sambandsflokkurin og fólkaflokkurin.

Javnaðarflokkurin hevur sum kunnugt stilla sín lista, hetta var gjørt á landsfundinum í apríl.

Seinasta fólkatingsval og seinasta løgtingsval vóru sonn sigursval hjá javnaðarflokkinum, og tað er einki at ivast í, at fjøldin eisini hesa ferð verður at taka undir við javnaðarpolitikkinum fyri at steðga ómegdar- og afturhaldspolitikki »sjálvstýrisflokkanna«, sum til fulnar hava prógvað, at teirra politikkur er ósosialistiskur, og at teir ikki vilja ganga útróðramonnum, fiskimonnum og arbeiðarum á møti í teirra mest natúrligu rættvísiskrøvum.

Hesum ósosialistiska heimapolitikki og teirra vitleysa stjórnarpolitikki mugu vit steðga, áðrenn skaðin er ov stórur — og vit gera tað við at

fylkjast um javnaðarflokkin.

Brævkassin

Brævkassin

Tað verður so ofta talað um persónligar atkvøður og listaatkvøður til tey ymisku valini, men ilt er at fáa skil á, nær tað eru tær persónligu atkvøðurnar, ið eru avgerandi, og nær tað er hin gamli valevnishátturin við nr 1, nr. 2 o. s: fr: er avgerandi.

Kann blaðið greiða nærri frá hesum?

Veljari.

SVAR: Til fólkatingsval og kirkjuráðsval eru tað einans tær persónligu atkvøðurnar, ið gera av, hvør valdur verður, meðan vit til løgtingsval og kommunuval framvegis hava hin higartil galdandi valháttin, har nr. 1 á listanum umframt tær persónligu atkvøðurnar eisini fær listaatkvøðurnar.

Veitst tú

At vegna sjálvstýrisflokkin hevur Marius Johannesen, ordførari flokksins á tingi, einans sett fram eitt uppskot á tingi, og tað var at leggja innflutningsgjald dá »Anders And« og »Skipper Skrk«, men at hann longu árið eftir var við til at taka alt gjald av tilíkum bløðum — !

AT tað er ein gamal rómverskur siður at brúka trúlovingarringar; teir gomlu rómverjar trúðu, at úr fjóðra fingrinum gekk ein kærleiksæðr beinleiðis í hjarta.

AT norskir serfrøðingar eru komnir til tað úrslit, at um bløðini, sum detta av trounum ikki rotna aðu vildi hagin eftir 500 árum verið vorðin nógv hægri enn tróini.

AT tungan av teimum allra størstu hvalunum ofta vegar sum ein hálvur elefantur og hjartað sum ein oksi.

AT fyrsta vísindaliga frágreiðing um eina sólarmyrking er skrivað í Kina ár 2697 f. Kr.

AT til 1 tíma arbeiði krevur heilin eitt kraftforbrúk, ið svarar til 1 milliwatt.

Eygjað

ORÐ, ORÐ — BARA ORÐ!

Álitið á sjálvstýrisflokkin í føroyskum politikki hevur verið støðugt minkandi; men vit kunnu sanniliga skilja hetta, tá ein hugsar um tvískinningspolitikk flokksins. Les bara, hvat málgagn flokksins skrivaði undan seinasta vali, og minst til, hvat sami flokkur gjørdi, tá valið var av og nýtt landsstýri skuldi skipast:

»... **Skilligt sæst nú, at hesir triggir flokkar** (t.e.: javnaðar-, sambands- og sjálvstýrisflokkurin), **sum stýrt hava landi okkara, liggja nærri upp at veruleikanum í livi føroyinga á sjógvi og landi — í øllum livinum — enn andstøðuflokkarnir ...«**

BARNAMATUR

KROSSORÐ:



Yvir: 1) skip 2) gudur 7) hygg 9) í pottinum 10) mál 12) rodnaði 14) venj 16) rómaratal 17) missur 19) óviss.

Niður: 1) vekt 2) fá tær 3) matur 4) net 5) avlop 8) tveir eins 11) geva 13) mál 15) lærdu 18) á.

BARTÚT

er tað makaleyst av teimum sokallaðu »sjálvstýrisflokkunum« á tingi at reypa sær av miklum uppbyggingararbeiði uttan at nevna eitt orð um, at meginparturin av peninginum til hesa uppbygging er fingin úr Danmark — og at hesin sami peningur annaðhvørt var útvegaður ella tilsøgn fingin um, longu áðrenn hetta landsstýri nakrantið sá dagsins ljós.

— Eg veit ikki, hvat teir gera í teimum nógvu nevndunum, tingið velur; men hvi skal eg blanda meg uppí slik smáting.

—o—

Sanna var tiltikin skjót at bera slatur. Ein dagin møtir hon Jógvan, keypmanni.

Jógvan: Nú ætli eg mær at flyta krambúðina út í Grønland.

Sanna: Hvat kemur tað mær við?

Jógvan: Nei, eg vildi bara siga tær tað, tí so sleppi eg frá at lýsa í bløðunum.

—o—

CHAMFORT: Hvussu nógv ringt ein maður hugsar um kvinnurnar, so finst hóast alt eingin kvinna, sum ikki hugsar enn verri um tær enn hann sjálvur.

—o—

Hanna: Kom inn og kroka í hesum ræðuliga veðrinum!

Anna: Nei, eg kann ikki; eg eri alt ov skitin um føturnar.

Hanna: Tað bilar ikki, tú ert í skóm.

Ein føroyskur filmur sum er gullverdur

Ein filmur, sum kann vísa okkara unga fólki, hvussu okkara gomlu forfedrar lívdu, má sigast at vera gullverdur — og meira verdur enn metast kann í peningi.

Ein tílíkan film sóu vit løgtingsmenn nú seinasta mánakvøld.

Tað er harra ursmiður J. A. Arge í Tórshavn, sum eigur æruna fyri, at ein slíkur filmur er komin fram. Eisini íbúgvarar í Húsavík skulu hava tøkk fyri, at tey hava gjørt eitt gott arbeið við at velta ein akur og skera hann og binda bundir, gera skrúgv, bera bundini inn í sornhúsið, ripa, strála kornið á sornspolum, kynda eld — sorneld — í munnan á sornkerinum, so kornið tornaði, so at treskja og tína tað í tíningartrogi,

Seinri varð kornið malið, og mjøl við knoðað til drýl.

Alt hetta sóu vit, og vit sóu eisini, tá ið drýlurin varð etin saman við smøri, garnatálg og øðrum.

Landsstýris- og løgtingsmenn eru á einum máli um, at tingið keypir henda filmin og letur næmingar í øllum skúlum síggja hann saman við tekst, ið skal greiða frá gongdint í øllum hesum.

Allir skúlar eiga at fáa ljósmyndartól og so læra henda filmin og fleiri aðrar uppslýsandi filmir.

Saman við akurfilminum sóu vit eisini ein annan film, sum eisini eigur at verða vístur í hvørjum skúla. Hesin filmur vísir fiskiveiðu við trolarum, línubátum og við smábátum, hvussu fiskur verður veiddur, og hagreiddur líka til hann er komin á borðið.

Vónandi fáa vit fleiri føroyskar filmar, sum síðan verða vístir í øllum okkara skúlum, so at komandi ættarlið fáa greiðu á, hvussu forfedrar okkara hava lívað og teirra kvøldsetur, sum kann verða verða upplýsandi og uppbyggjandi í staðin fyri alt hitt fiasið, sum eg ikki leggi í at siga meira um.

At enda vil eg einaferð enn takka harra J. A. Arge og teim, sum saman við honum hava gjørt eitt so dygdargott arbeið, ið kann varðveita læruna um, hvussu okkara forfedrar dvrkaðu korn og í heila tíkið arbeiddu, lívdu í arbeiði, leiki og øllum starvi á landi og sjógvi.

Mín áskoðan er tann, at hitt almenna eigur at veita harra J. A. Arge eina sámuliga og góða samsvning fyri akurfilmin, og eggja honum til at fara undir starvið við at fáa í lag fleiri aðrar føroyskar filmar eins góðar og virðismiklar sum henda akurfilmin úr Húsavík.

J. H. Danbjørg

E. s. um okkurt kanska er at nevna eðrvisið, enn eg havi skrivað tað í omanfyri standandi grein, takki eg fyri leiðbeining í SOSIALINUM.

JHD.

Skipafelagið Føroyar

TELEFON 1225

Tórshavn

GRÓT OG SKERVUR

Øll, ið vilja keypa skerv ella grót, eiga at venda sær til kommunukantórið.

Grót og skervur megu vera goldin fyrst, áðrenn tey verða heimtað.

Bilstjórar verða ámintir, at teir ikki kunnu heimta grót ella skerv uttan við einum limi av vegnevndini ella einum umboðsmanni fyri kommununa.

FRODBIAR SOKNAR KOMMUNA

Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum sum við gávum, telegrammum og komu inn á gólvið og gleddu meg á 50 ára degnum.

Heilsan.

Ludvik Johannesen,
Dali.

SØKKIÐ BISMARCK!

eftir C. S. FORESTER

umsett hevur MICHEL NIELSEN

(Framhald)

XIV. KANÓNTORNINI SVINGA

Djúpt niðri í afturskipinum á Bismarck var bólamyrkur, uttan har tær elektrisku hondlampurnar lýstu. Vatnið skvaggaði aftur og fram í ljósgeislunum. Arbeiðsfólkið harniðri tóktist eins og skuggamyndir. Av og á sást ein maður í kavarabúna á veg niður í tað sjóðandi vatnið. Eitt sindur longur frammi var ein marinari við at leggja ein elektriskan neyðleiðning, teir skuldu veita ljós til øll tey myrku støðini og eina løtu seinni glógvaði tað myrkra vatnið av ljósi. Pumpurnar arbeiddu, tá kavarin kom uppaftur við blóðinum streym andi út úr einum sári í okslini. Hann gav frágreiðing sína til ein av yvirmonnunum, ið vóru hjá, hesin fór alt í einum til telefontna, ið hekk á einum av skottunum og lat frágreiðingina fara viðari. Fyri at koma til telefonina noyddist hann at fara til einar vatntættar dyr, og tó at tær beinan vegin blivu stongdar, streymaði vatnið inn yvir lúkukarmin, tí skipið bóltaði so illa. Nakrir menn vóru í ferð vit at seta skorður ímóti skottunum, og hann mátti mina til teirra at teir skuldu halda upp við at hamra fyri at hann kundi tosa í telefonini. Chefurin tók móti boðunum inni í bestikkrúminum. »Ja,« segði hann. »Eg havi skilt tygum, javel.« So legði hann rørið á og vendi sær móti Lütjens og hinum ið hjá vóru. »Teir halda ikki, at tað er gjørligt at vala um skaðan,« segði hann. »Eisini halda teir, at vit eru noyddir at liggja uppi, tí tey vatntøttu skottini halda ikki, um vit fáa sjógvin inn aftanifrá. Vit vera soleiðis noyddir at halda hetta stavnhald, so gott, vit kunna.« »Tað merkir, at vit fara fram fyri at møta vandanum í staðin fyri at renna frá honum,« segði Lütjens. »Hetta vil dáma foraranum. Stabschefurin kom við nøkrum boðum í hondini. »Berlin hevur júst sent eini long boð,« segði hann, »eitt samandrag av øllum teimum tíðindunum, sum teir hava kunnað fingið tilvega. King George V er okkurt umleið 50 fjórðingar frá okkum við stavnhald í ein útnyrðing.« Ein annar stabsyvirmaður opnaði handbókina og greiddi frá: »Fjúrtan tummar kanónir, ferð 28 mil, 35.000 tons Liðugtbygdur seinasta ár. Flaggskip hjá admiral Tovey, og chefkommandørurin eitur Patterson.« »Renown og Ark Royal...« »Tað er megi H,« segði Lütjens. »Teir kenna vit.« »Og so eru nakrir torpedooyðarar, helst standa teir undir kommandør Vian — maðurin, sum tók Altmark — sum er beint norðanfyri okkum. Eftir teirri positión, sum Berlin sigur frá, skuldi vit kunna sað teir nú.« »Teir koma sikkurt skjótt,« segði Lütjens. »Eg hevði annars hopað, at kunna fingið frið, áðrenn slagið í morgin.« »Menninir sovna á varðhaldsplássum teirra, harra admiralur,« segði Lindemann. »Ja,« segði Lütjens. »Og har er Roðney,« helt stabschefurin fram. »Hann hevur samband við King George V, hann er kanska longu komin saman við hann.« Hin stabsyvirmaðurin opnaði bókina uppaftur: »Sekstan tummar kanónir, ferð 24 mil, bygdur beint aftaná fyrra heimsbardaga. Chefur, Kommandør Dalrymple Hamilton.« »Meir enn tjúgu ára gamal,« segði Lütjens. »Hann kenni eg væl. Eg át morgunmat harumborð einaferð á Malta; tað var í 1924, tá eg var ungur loytnantur.« Lütjens hevði ikki stríð av at siggja hetta bílætið fyri sær sjálvum. Hitin og ta brenn andi sólarljósið og tað stilla vatnið í havnini — alt so ymiskt frá tí kalda froysandi sjónum og tí gráa himmalinum — og tað skínandi reina slagskipið, nýmálað við blankpussaðum messingi allastaðni.

Vaktin við landgongdina við bátsmansfløytum, yvirmenn, sum bjóðaðu vælkomin á afturdekkinum, hvar Lütjens fylgdi chefi sínum. Tær nógvu heilsurnar og annað, áðrenn tann bretski chefurin endiliga fórdi gestur sínar niður í eina rúmliga salon við finum møblum og eitt borð dekkað við hvítum dúkum og finum krystalli. »Tað var tann bretski flotin í friðartíð,« mutlaði Lütjens.

(Framhald.)